


Her kemur tann risastóri goymslutangin, sum skal standa á havbotninum á Solan kelduni, til Lerwick. Mynd Paul Moar.

# Enn ein oljuútbygging nærkast við markið

Deil:



**Jan Müller**

29.07.2014 - 15:15

Oljan.fo

*Hóast tað er langt millum útbyggingar av oljufeltum í bretskum øki, so standa fleiri slíkar á skránni vestan fyri Hetland komandi árini.*

*Ein teirra er útbygging av oljufundinum Solan, sum liggur miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið.*

*Tað er oljufelagið Premier Oil, sum stendur fyri útbyggingini og varð eitt týðandi stig til at kunna byrja framleiðslu tikið nú um dagarnar, tá ein stórur oljutangi kom til Lerwick*

*úr Dubai. Hann kann goyma 300.000 tunnur av olju og verður í næstum fluttur á oljuleiðina sunnan fyri Schiehallion og Foinaven oljufeltini.*

*Oljuleiðin Solan er mett at goyma 40 mill. tunnur av olju og skal framleiða 24.000 tunnur um dagin, tá hon fer undir framleiðslu við ársenda í ár. Ætlanin er at pallurin, sum verður settur upp á 135 metrar dýpi, skal vera ómannaður.*



